# PSSST!

## 2 SPENNANDI STØRV ERU LEYS AT SØKJA

### ERT TÚ OKKARA SØLULEIÐARI?

Vilt tú verða OKKARA søluleiðari og menna eina fyritøku í vøkstri, so ert tú tann, vit leita eftir. Vit hava brúk fyri tær til at menna marknaðarstøðuna hjá OKKARA bryggjaríi. Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna millum annað um at:

**Gera marknaðarætlanir, menna og styrkja vøruúrvalið, skipa søluarbeiðið til kundar okkara, røkja okkara kundar og standa fyri øðrum vanligum søluarbeiði**

Tað er ein treyt, at tú hevur royndir sum sølufólk, ert við upp á tað, arbeiðir sjálvstøðugt og dugir at samstarva. Vit vænta eisini, at tú ert fyrikomandi og ert til reiðar at hjálpa til, tá ið á stendur á bryggjarínum.

### ERT TÚ OKKARA ROKNSKAPARFÓLK?

Til bryggjaríið hava vit eisini brúk fyri roknskaparfólki til bókhaldsuppgávur og fíggjarstýring. Arbeiðsuppgávurnar eru ymiskar og fevna eitt nú um:

**Fíggjarstýring og rapportering, ger av fíggjarætlanum, bókhald, goymslu- og framleiðsluuppgerð og annað skrivstovuarbeiði**

Vit treyta okkum, at tú hevur starvsroyndir í roknskapararbeiði og bókhaldi, og at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er eisini fyrimunur, at tú hevur viðkomandi útbúgving í roknskapi og bókhaldi.

OKKARA er eitt bryggjarí í menning og vøkstri. Dagliga arbeiðið er tí sjálvandi merkt av hesum, har tað til tíðir kann vera rokmikið við nógvari ferð. Arbeiðsuppgávurnar verða skipaðar í tøttum samstarvi við leiðsluna, og vit leggja dent á góð samstarvsevni.

Talan er um fulltíðarstørv, og lønin verður ásett eftir avtalu.

### VILT TÚ VITA MEIRA?

Vilt tú vita meira um eitt av størvunum, so vend tær til Óla Hansen, nevndarformann, telefon 517316, ella send honum eitt teldubræv til oha@faroe-law.fo.

**Umsóknarfreistin til bæði størvini er 27. september 2010.**

Umsóknir skulu sendast til:
Spf. OKKARA
Postboks 26
100 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

BRYGGJAÐ VIÐ NÆRLAGNI
OKKARA
Føroyar
SMAKKUR OG GÓÐSKA

**WWW.OKKARA.FO**

SENDISTOVAN